ES-kreppa og búskapur:

# Hvussu verður politisk-búskapar

????
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Politiska og búskaparliga kreppan í ES setir síni spor á kurvumyndini, sum vísir styrkislutfallið millum dollar og euro. *Sjá mynd 1*

Tá tað gjørdist greitt, at fólkaatkvøðurnar í Frankaríki og Hollandi fóru at enda við einum nei, viknaði euran. Tá fólkaatkvøðurnar sum væntað vístu eitt klárt nei, fall valutan enn meir. Og nú ið statsovastarnir í Europeiska Ráðnum, saman til fundar í Bruxelles herfyri, hvørki kundu semjast um komandi langtíðarfíggjarlóg ella geva nakað klárt boð uppá hvussu tann politiska og strukturella kreppan skuldi loysast, ja - so fall euran enn einaferð. Tó so, at tað sær so út, at felagsvalutan nú hevur stabiliserað seg á einum støði, har ein euro gevur 1,21 dollara..

Men í hesum nógva tosinum um europeiska kreppu, og fallandi euro-virði, skal ikki gloymast at USA og dollarin eisini hava sínar trupulleikar at dragast við.

## Trupulleikarnir í USA

Sum viðgjørt fleiri ferðir í hesum teigi, kann sigast heilt einfalt, at amerikanski búskapurin hevur tvær positivar og tvær negativar síður. Tað positiva er, at vøksturin í framleiðslu er rættiliga stórur, og væl størri enn í ES sum heild. Hesi høvuðstøl eru sett saman í hjástandandi talvu

| | ES | USA |
|---|---|---|
| Framleiðsluvøkstur (GDP)* | 1,4 % | 3,5 % |
| Arbeiðsloysi í % | 8,9 % | 5,1 % |
| Handilsjavni | + 69 mia. $ | - 710 mia. $ |
| Gjaldsjavni | + 42 mia. $ | - 717 mia. $ |
| Fíggjarlógarhall í % av GDP | - 2,8 % | - 4,1 % |

*2005 estim. (Kelda: The Economist)

Í USA dekkar hugtakið *"the twin deficits"*, at stórt hall er bæði í fíggjarlógini og í viðurskiftunum við umheimin. Tað sæst klárt í talvuni. Stóra hallið á gjaldsjavnanum skal dekkast uppá onkran máta, og higartil hevur innfløðingin av kapitali til USA verið nóg stórur til at dekka hetta hallið. Tað hevur loyst seg at gera íløgur í dollar-eindum. Spurningurin er, hvussu leingi tað heldur fram. Og seinastu meldingarnar vísa, at tað gongur ikki so væl í løtuni. Í apríl floymdu bert 48 mia. $ til landið, men hallið var í sama mánaði uppá 57 mia. $.

## Búskaparligu trupulleikarnir í ES

Á europeisku síðuni eru onnur vandamál at dragast við, men tey eru eisini álvarslig.

Framleiðsluvøksturin er seinur, í meðal 1,4%. Men stórur munur er á londunum. Í Svøríki og Spania væntast vøksturin í 2005 at blíva uppá 2,8%. Danmark liggur eisini í betra endanum við einum búskaparligum vøkstri uppá 2,1%. Men í hinum meira "sjúkliga" endanum liggur Italia illa fyri við stagnatión uppá 0,3%, og hetta landið hevði í 1. kvartali í ár eina reella afturgongd uppá -1,8%. So vinnulívsmaðurin Berlusconi hevur verið landinum ein dýrur drongur uppá mangar mátar.

Arbeiðsloysið er framvegis høgt í ES, og eingin lætti í mjørkanum er at sjá. Meðaltalið er 8,9%. Men verst stendur til í teim stóru londunum Frankaríki, Týsklandi og Spania har tað er 10% ella meira. Taka vit eystara part av Týsklandi, tað gamla DDR, so eru næstan 20% arbeiðsleys, fimti hvør. Hinvegin er avlop á bæði gjalds- og handilsjavna í ES.

## Politiskir trupulleikar í ES, men enn ongar loysnir

Støðan í ES aftaná fólkaatkvøðurnar í Frankaríki og Hollandi, har úrslitið segði Non og Nee, kann av sonnum kallast kreppa. Men kreppur hava verið fyrr, og sum heild má sigast at ES í europeiskum sambandi kann vísa á stór úrslit. Hvussu gongdin vurderast, veldst sjálvnaði um hvørja støðu maðurin hevur til ES, fyri ella ímóti, ella bara skeptiskur.







## "Det gik ad helvede til"

Á fundinum í Europeiska Ráðnum í farnu viku vóru tvey stórmál á skránni, men hvørgi fekk nakra loysn. Tað var ein sjálvfylgja, at støðan aftaná nei-atkvøðurnar í Frankaríki og Hollandi skuldi viðgerast. Hartil hevði luxemburgski formannsskapurin sett langtíðar fíggjarætlanina á dagsskránna.

Danska "Politiken" tekur ramliga til í síni oddagrein (20.06.05) um henda fund: *"Alle gjorde, som man måtte forvente, og det gik ad helvede til. EU-topmødet i Bruxelles brød sammen, det afstod fra at give et egentligt svar på den demokratiske krise, som nej'erne har åbnet, og benyttede i stedet lejligheden til at smadre budgetporcellænet i fuld offentlighed."*

Tony Blair helt fast um ta avsláttarskipan, sum bretar hava havt síðan 1984. Hon ger at bretar sleppa bíligari enn onnur lond av tilsvarandi støðd. Hinvegin vildi franski presidenturin Chirac ikki slaka uppá landbúnaðarskipaninar, CAP ella Common Agricultural Policy, sum gevur franskmonnum stórar fyrimunir. Støðan er í løtuni læst føst, og tað sær ikki mætari út enn at manningin sum situr í løtuni er uppslitin og troytt. Politiken lýsir politikkara-liðið soleiðis: *"Selv om det Europæiske Råd rummer flere opportunister, egotrippere og politiske ringvrag end sæd-*